Ákærin í hassjmálunum:

# Ikki talan um nýggja siðvenju

**Mánadagin var so fyrsti dómur sagdur í teimum stóru hassjmálunum. Talan er um størstu nøgdirnar nakrantíð, og tí er talan um nýggja rættarsiðvenju, sigur ákærin**

HASSJMÁL
*Páll Holm Johannesen*



Seinastu mánaðirnar hevur verið ljós varpað á stóru nøgdirnar av hassji, ið serliga útlendingar hava roynt at flyta inn til Føroyar. Dómur varð mánadagin sagdur í málinum um 29 ára gamla íslendingin, sum í juli mánaði royndi at smugla 19,9 kilo av hassji til Føroya. Íslendingurin varð dømdur til at sita inni í 21 mánaðir, og hann tók við dóminum

Vanlig mannagongd hevur verið í hassjmálum í Føroyum, at tað verður givið tveir mánaðir fyri hvørt kilo av hassji. Málið við íslendinginum breyt hesa siðvenjuna. Dómurin áljóðandi 21 mánaðir var ein linari dómur, tí íslendingurin fekk bert 21 mánaðir fyri síni góð 20 kilo, og dómurin er bara helvtin av tí, vanlig revsing plagar at vera.

### Ikki siðvenja

Ákærin í málinum, Dorthe Møller Andersen, kravdi revsingina ikki verða minni enn 39 mánaðir, men dómarin gekk ímóti henni. Hóast íslendingurin fekk linari revsing, so væntar hon ikki, at hassjmál í framtíðini verða linari revsað í Føroyum í framtíðini.

– Hetta er fyrstu ferð, at sakarmál er um so stórar mongdir av hassji í Føroyum, og hóast íslendingurin fekk mongdarrabatt, so vænti eg, at vit fara halda fast tveir mánaðir fyri kilo fyri tær smærru nøgdirnar, so talan verður ikki um nakra nýggja siðvenju, greiðir Dorthe Møller Andersen frá.

Dorthe Møller Andersen hevur framvegis ikki avgjørt, um málið skal roynast í Eystara Landsrætti.

### Visti ikki av stóru nøgdina

Undir avhoyringunum játtaði íslendingurin, at hann hevði góð 20 kilo av hassji á sær, og ætlanin var at halda fram til Íslands við hassjinum. Hann róð framundir, at orsøkin til, at hann royndi at flyta hassjið inn var, at hann skyldaði einum manni 500.000 krónur, sum hann hevði tapt í pokerspæli.

Íslendingurin gjørdist ovfarin av, at hann hevði so stórar nøgdir á sær, tí sambært tí ákærda, so høvdu onnur krógvað hassj í bilhurðini hjá honum.

Verjin hjá íslendinginum legði dent á, at tann ákærdi var á veg til Íslands, og at íslendarar ikki hava eins harða revsing í hassjmálum sum Føroyar, og tað átti dómarin at taka við í dømingini.

### Næsta málið í september

Næsta stóra hassjmálið kemur fyri rættin einaferð í september. Hesum váttar Dorthe Møller Andersen, sum eisini verður ákæri í tí málinum. Tá verður talan um ein dana, ið seinast í juni mánaði royndi at flyta inn góð 20 kilo hassji til Føroya .

Ákærin sigur, at væntandi verður sama upplegg ímóti dananum. Hetta merkir, at ákærin fer at leggja seg eftir, at danin fær um 40 mánaðir fyri tey tjúgu kiloini.

– Sakin ímóti dananum minnir nógv um málið ímóti íslendinginum, og tískil verða málini viðgjørd nærum eins, og ti fara vit at krevja tað sama í tí málinum, greiðir Dorthe Møller Andersen frá.

## Neyðtøkumálið framvegis undir viðgerð

Málið um teir báðar italiumenninar, ið eru ákærdir fyri at hava neyðtikið ein 15 ára gamla norska gentu á einum gistingarhúsi í Havn, er framvegis undir viðgerð.

Menninir eru skuldsettir fyri neyðtøku og neyðtøkuroynd, og teir eru framvegis varðhaldsfongslaðir. Varafútin, Finn Ougaard sigur, at framvegis ber ikki til at siga nær málið fer fyri rættin, tí málið er framvegis undir viðgerð.

Italiumenninir eru varðhaldsfongslaðir til fyrst í september mánað.

**-páll**

# Fyrstu íbúðirnar lidnar um tveir mánaðir

**Framvegis eru ikki allar íbúðirnar hjá SP/F Átak seldar við Marknagilsvegin. Arbeiðið gongur væl, og væntandi verða allar íbúðirnar klárar um ársskiftið**

BYGGING
*Páll Holm Johannesen*



*Tíðarætlanin hjá SP/F Átak heldur við íbúðarbyggingini við Marknagilsvegin. Væntandi verða allar tjúgu íbúðirnar klárar um ársskiftið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað líður væl við íbúðarbyggingini á Marknagilsvegnum. Hóast smápartafelagið Átak hevði trupulleikar við byggiloyvinum, so røkist alt fyri, at tíðarætlanin fer at halda hjá felagnum. Ætlanin er, at allar tjúgu íbúðurnar skulu verða klárar um ársskiftið, og longu um tveir mánaðir verða tær fyrstu klárar at flyta inn í.

Torkil við Sandá, ið stendur fyri byggingini, sigur, at arbeiðið hevur gingið sera væl, og at einir tíggju mans hava verið til arbeiðis, síðan farið varð undir byggingina.

### Ikki allar seldar

Tað verða í alt 20 íbúðir, tíggju í hvørjari hædd. Talan er um flytiklárar íbúðir, har hvítvørur, flísar, tapet o.a. er íroknað í prísinum. Íbúðirnar eru um 63 m² hvør.

Framvegis eru nakrar av íbúðunum tøkar. Torkil við Sandá upplýsir, at kostnaðurin á íbúðunum liggur millum 985.000 og 1.085.000. Hann er sannførdur um, at tað fer at eydnast honum at sleppa av við allar íbúðirnar.

Í løtuni verður arbeitt við at gera eitt goymslu- og fýrrúm. Goymslu- og fýrrúmið verður bygt ímillum báðar íbúðarblokkarnar. Í samband við nýggju íbúðirnar, verður eisini ein nýggjur vegur bygdur. Innkoyringin til íbúðirnar verður frá Handilsskúlanum, har ein vegur verður bygdur sum framhald av innkoyringini til Handilsskúlan.



# Høvuðssæti uttan stjóraskrivstovu

**Tað verður eingin stjóraskrivstova smíðað í nýggja høvuðssætinum hjá Føroya Tele, sum verður »reist« fríggjadagin. Eins og alt starvsfólkið skulu stjóri og deildarstjórar sita í opnum kontórlandslag, tá at kalla øll fyritøkan flytur niðan í fjøllini komandi ár**

NÝBYGGING
*Rúnar Reistrup*



*Tað hevur gingið skjótt at reisa komandi høvuðssæti hjá Føroya Tele. Fyri einum ári síðan var einki her.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tey, sum dagliga koyra framvið høvuðsinngond høvuðsstaðins í Hoyvík hava mestsum hvønn dag sæð eina broytta sjón síðsta árið. Føroya Tele byggir nýtt høvuðssæti, og tað gongur skjótt. So skjótt at tað letur til, at eitt av Føroya størstu arbeiðsplássum kann flyta inn í nýtt umhvørvi ein ella tveir mánaðir fyrr enn ætlað.

- Vit hava roynt ein nýggjan arbeiðshátt í byggingini, har ábyrgdin fyri byggingini er javnt býtt millum Føroya Tele og byggifyritøkurnar, soleiðis at Føroya Tele og byggifyritøkurnar eru felags um at gjalda møguligan eykakostnað og harvið eisini býta møguligar sparingar ímillum sín, sigur Andras Róin.

Og hesin háttur hevur virkað. Tá bygningurin eftir øllum at døma stendur liðugur seint komandi summar, fer hann neyvan at kosta eina krónu meir enn ætlað. Tað er Føroya Tele stjórin rættiliga stoltur av.

- Tað man ikki vera heilt vanligt at føroysk byggiarbeiði bæði eru til tíðina og ikki fara útum kostnaðin, so hesin samstarvsháttur hevur virkað væl, sigur Andras Róin.

Nýggja høvuðssætið hevur verið leingi í væntu, og Føroya Tele hevur leingi havt brúk fyri tí. Gamla høvuðssæti á Tinghúsvegnum var eftirhondini vorðið ov lítið, og tí hevur fyritøkan verið spjadd út á fleiri adressur í høvuðsstaðnum. Tær verða allar frágingnar, tá nýggja høvuðssætið er innflytingarklárt.

Fríggjadagin í hesi vikuni verður reisigildi hildið fyri teimum, sum hava verið við í arbeiðinum at gera bygningin.

Tað er arkitektavirkið Árni Winther, sum hevur teknað nýggja høvuðssætið hjá Føroya Tele.

# Klaksvík poppar seg upp

**Bæði poppurin og Klaksvíkin eru um at verða skumpað út á eitt síðuspor í føroyska mentanarlívinum. Tað skal ein popfestivalur í Klaksvík nú gera nakað við**

POPPFESTIVALUR
*Rúnar Reistrup*



*Popparar sum hesir báðir jassarnir, skulu hava meira rúm í føroyska mentanarlívinum halda klaksvíkingarnir handan nýggja poppfestivalin*

Poptónleikurin hevur ilt við at fóta sær í føroyska mentanarlívinum. Listastevnan er ov hámentað til pop, G! festivalurin ov alternativur til pop, og á Prix Føroyum hevur poppurin av onkrari orsøk verið illa umboðaður seinnu árini. Tað heldur Steintór Rasmussen, og tað er hann ikki einsamallur um, í hvussu er ikki í Klaksvík, har ein arbeiðsbólkur nú er farin undir at arbeiða við at skipa fyri einum poppfestivali komandi ár. Tað er í stóran mun fólkini kring Studio Pegasus, sum ganga aftur í hesum arbeiðsbólkinum.

### Klaksvík í fokus

Poppfestivalurin skal eftir ætlan vera eitt afturvendandi summartiltak, sum skal seta fokus bæði á poppin og á Føroya næststørsta bý. Tí á ein hátt hevur Klaksvíkin sama trupulleika sum poppurin. Hon er ov lítið við í mentanarlívinum. Til dømis hevði Listastevnan einki tiltak í Klaksvík í ár, og Prix Føroyar kom heldur ikki sum vanligt til Klaksvíkar í ár, men fekk sær ístaðin fastan basa í Fuglafirði. Og meðan júst Fuglafjørður hevur fingið sær Mentanarhúsið, Gøta hevur fingið sær G! festival, og mest av øllum Havnin, sambært Steintóri Rasmussen, er ríkað við Listastevnuni, er Klaksvíkin um at verða afturútsigld í mentanarhøpi.

- Vit hava altíð havt eitt ríkt mentanarlív her í býnum og nógvur góður tónleikur er sprottin hiðani. Men tað sæst ikki nóg væl aftur í løtuni, sigur Steintór Rasmussen. Av tí sama hava hann og onnur leingi hugsað um hvat kann gerast fyri at skapa lív í býnum um summarið. Ætlanir hava verið frammi um at flyta Norðoyastevnuna, men tað er lættari sagt enn gjørt.

- Býnum hevur leingi vantað okkurt serligt tiltak í summarmánaðunum. Vit hava Norðoyastevnuna, men hon liggur í so tíðliga á árinum. Klaksvíkingar í útlegd og onnur fyri tað skulu helst hava eitt gott høvi at koma Klaksvíkar í summarfrítíðini. Tí vænti eg at hesin festivalurin umframt at tæna føroyska tónleikalívinum, fer at megna at fylla eitt tómrúm í summarinum her norðuri, sigur Steintór Rasmussen.

### Afturvið Listastevnuni

Tað er longu lagt fast, at popfestivalurin verður hildin í fyrru helvt av august mánaði komandi ár. Harvið er longu sagt, at popfestivalurin verður um somu tíð sum Listastevna Føroya. Hesum síggja fyrireikararnir tó ongan trupulleika í.

- Persónliga haldi eg ikki, at tað bilar nakað, tí okkara festivalur og Listastevnan eru heilt hvør sítt tiltak og draga hvør sítt fólkaslag til sín. Eg skal tó viðganga, at um Listastevnan fevndi meira breitt, so hevði tað verið verri at rættvísgjørt, at vit hava lagt festivalin samstundis sum Listastevnan koyrir. Men sum tað sær út nú, trúgvi eg ikki, at so nógvir klaksvíkingar fara til Havnar á Listastevnu, um so tað er popfestivalur í Klaksvík ella ei, og Listastevnan kemur jú ikki her. So tað er heilt sikkurt pláss fyri báðum, sigur Steintór Rasmussen.

Hann væntar heldur ikki, at nýggi popfestivalurin fer at geva øðrum stevnum og festivalum trupulleikar við at finna fígging.

- Tað skulu gjarna ikki verið nógvar konsertir á festivalinum, sum ikki bera seg sjálvar fíggjarliga, men onkrar stuðlar skulu vit sjálvandi hava. Tað nýtist tó ikki at ganga út yvir hini tiltøkini. Bæði bryggjaríini og allir peningastovnarnir í landinum kunnu ikki stuðla sama tiltaki, sigur Steintór Rasmussen, sum saman við øðrum er farin undir royna at fáa útlendsk og føroysk popnøvn til Klaksvíkar komandi summar.